# FM dystur á hvítusunnu

*Talv: Avgjørt er, at umdysturin um FM heitið ár 2000 millum teir tríggjar John Rødgaard, Flóvin Tór Næs og Torbjørn Thomsen verður leiktur í vikuskiftinum 9-11 juni.*



CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Tá kappingin í landsliðsbólkinum í ár var av, endaðu tríggir ovastir. Hesir hava nú havt talvfrí í hálvan annan mánað, men nú er boð eftir teimum aftur.

John Rødgaard hevði eina góða FM kapping á Oyrarbakka. Hann tapti einki talv, og líkt var til at hann fór at draga tað longra stráðið, men javnleikur hansara í síðsta umfari gav Flóvini T. Næs og Torbirni Thomsen møguleikan at fáa javnlík stig, og hendan tóku teir við at vinna síni talv í síðsta umfarinum. Tí verður nú umdystur leiktur millum hesar tríggjar.

Umdysturin verður skipaður á ein heldur øðrvísi hátt enn undanfarnir umdystir. Eitt nú verður telvað einkultumfar, og ikki dupultumfar, sum gamalt var. Fyrsta talvið verður fríggjadagin 9. juni kl. 14.00, næsta talvið 10. juni kl. 14.00 og tað triðja og seinasta hvítusunnudagin 11. juni kl. 10.00. Um javnstøða verður eftir umdystin, verður telvað tvey kviktalv sama kvøldið. Um eingin vinnari er funnin tá, verður telvað snartalv til vinnari er funnin. Peningavirðislønir verða givnar til tveir teir fremstu. Enn er staðið, har telvast skal, ikki kunngjørt, men helst verður telvað í Havnini. Nærri verður lýst seinni. Dómari verður Jonhard Klettsheygg.

**Lutakastið sær soleiðis út:**
Fyrstnevndu hava hvítt
Torbjørn — Flóvin
John R. — Torbjørn
Flóvin — John R.

Flóvin hevur sostatt hvítt móti Rødgaard í seinasta talvinum í hesum sera spennandi trýmansumdysti. Ringt er at pilka nakran favoritt út, men Rødgaard hevur fyrimunir tá hugsa verður um royndir, og verður hann helst skírdir favorittur millum telvarar. Flóvin hevur telvað ótrúliga nógv tað seinasta ári við góðum úrslitum, og kann saktans yvirraskað. Torbjørn hevði eina fantastiska FM kapping og heldur hann støðið skal hann avgjørt ikki undirmetast. Áhugavert er, at allir telvaðu javnleik móti hvørjum øðrum á Oyrarbakka.

Um ein ikki fær stundir at sjáa umdystin, so verður møguligt at fylgja beinleiðis við á alnetinum. Meira fæst at vita á TSF heimasíðuni www.sam-teld.fo/talv . Eisini verða talvini víst á stórskíggja við viðmerkingum. Vert er at nevna, talvútisetarnir í Keypmannahavn hava fingið nýggja heimasíðu, sum kallast www.talv.dk

**Talvstubbi**
Í Sarajevo er sterk kapping júst lokin. Nøvn sum Gary Kasparov, Shirov, Adams, Morozevich, Topalov og føroyavinurin Ivan Sokolov luttóku í hesari tólvmanskapping. Áðrenn síðsta umfar var Kasparov hálvt stig framanfyri spániumannin Alexei Shirov og bretan Michael Adams, og eftir síðsta umfar var støðan óbroytt.

Kasparov hevur nú í eini tvey ár vunnið allar kappingarnar hann hevur luttikið í, undantikið eina alnetiskapping har hann í finaluni tapti ímóti hálendingum Jeroen Piket, so spurningurin er um Vladimir Kramnik yvirhøvur kann hótta tann nærum ósvikaliga Kasparov í komandi HM dysti teirra millum, sum verður í oktober mánaða í ár.

**Endaliga støðan í Sarajevo:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Kasparov | 8,5 / 11 |
| 2-3 | Shirov | 8 |
| 2-3 | Adams | 8 |
| 7. | Sokolov | 4,5 |



*John Rødgaard er ein av trimum telvarum, sum skal royna seg i umdystinum um FM*

# Í evstu løtu

*2. deild: Við 10 monnum á vøllinum, eydnaðist tað í seinastu løtuTB at frá javnleik móti ÍF*

JÁKUP MØRK

Tvørámenn fegnaðust eftir dystin leygardagin móti ÍF.

Størsta orsøkin til fagnaðin var uttan iva málið, sum Óli Johannesen fekk tá vanliga leiktíðin var væl og virðiliga runnin, tí umframt at tryggja teimum javnleikin, hevði málið eisini við sær, at TB nú atur er á ovasta sessinum í 2. deild.

**Javnur dystur**
Talan var annars um ein rættuliga javnan dyst leygardagin, har tvey av liðunum, sum verða roknaði millum fremstu boðini til uppflyting, dystaðust móti hvørjum øðrum.

Liðini høvdu eisini hampuliga virðing fyri hvørjum øðrum, og hetta viðførdi eisini, at hvørgin parturin leyp framav, soleiðis at verjuparturin møguliga gjørdist ov tunnur.

Fyrri hálvleikur endaði eisini málleysur, men miðskeiðis í seinna hálvleiki tók dysturin eina, at síggja til, avgerandi vend.

**Yvirtóku 10 móti 11**
TB leikari varð rikin av vølli, og áðrenn tvørámenn høvdu fingið skipað seg so nøkunlunda, hevði júst innskifti Jógvan Arnfinn Jacobsen sett bóltin í netið hjá tvørámonnum.

Hóast teir nú vóru í yvirtali, so trektu fuglfirðingar seg nakað aftur á vøllin, og hetta gav TB møguleika at leggja stórt trýst á ÍF málið.

Tað var tó fleiri ferðir um reppið, at ÍF økti um leiðsluna, men Magni Hentze í TB málinum framdi fleiri góðar bjargingar, tá fuglfirðingar kontraðu.

Tá klokkan var farin um teir 90 minuttirnar, vóru fuglfirðingar framvegis á odda, men sum úrslitið sigur frá, so helt hendan støðan sær ikki.

Eftir frísparksinnlegg og stútara á tvørstongina, eydnaðist tað at enda Óla Johannesen at senda bóltin í netið, og so fingu fegnu tvørámenninir eitt stig við sær heimaftur.

Hetta var eisini nóg mikið til at TB aftur slapp upp á fremsta sessin í deildini, og so er spurningurin, um teir megna at verja hendan, tá teir komandi vikuskifti fáa vitjan av LÍF.

Fuglfirðingar fáa tá vitjan av NSÍ, sum so smátt tykist at vera komið væl fyri seg.

**ÍF-TB 1-1 (0-0)**
1-0: Jógvan Arnfinn Jacobsen
1-1: Óli Johannesen

**Støðan, 2. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 14 | 13 | 1 | 10 |
| 2 | ÍF | 5 | 2 | - | 3 | - | 0 | 12 | 5 | 7 | 9 |
| 3 | EB/Streymur | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 9 | 7 | 2 | 9 |
| 4 | NSÍ | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 8 | 5 | 3 | 8 |
| 5 | B36 | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 10 | 7 | 3 | 7 |
| 6 | GÍ | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 9 | 9 | 0 | 7 |
| 7 | LÍF | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 5 |
| 8 | KÍ | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 2 | 9 | -7 | 5 |
| 9 | HB | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 13 | 16 | -3 | 4 |
| 10 | Royn | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 4 | 9 | -5 | 4 |



*Flemming Østergaard hevur enn einaferð tikið danska fótbóltsheimin á bóli*

# FCK nýggjan venjara

*Víðgitni Roy Hodgson skal nú venja Toda Jónsson*

JÁKUP MØRK

Í gjár bórust boð um, at FCK hevur skrivað tvey ára sáttmála við onglendingin, Roy Hodgson.

**Hevur virkað víðað**
Talan er ikki um nakran ársunga, sum FCK við hesum hevur fingið fatur á. Áður hevur Hodgson virkað sum venjari í Svøríki, Sveits, Italia og Onglandi, og hevur hann millum annað havt ábyrgdina av Sveisiska landsliðnum, Inter og Blackburn.

Annars er rættuliga sermerkt fyri onglendingin, at hann noyddist uttanlands fyri at gerast kendur. Tað var nevnliga ikki fyrr hann hevði verið í trimum teimum fyrstnevndu feløgnum, at hann slapp at royna seg í bestu ensku deildini.

Fyrsta árið hjá Blackburn fekk hann sera góð úrslit, men tá niðurtúrur teirra byrjaði á heysti 1998, fekk hann sekkin, uttan at hetta tó broytti stórvegis upp á støðuna í felagnum.

**Steypið burtur**
Annars skrivaði Ekstra-Bladet eisini í gjár, at steypið, sum Jákup Mikkelsen og Herfølge fingu handað sunnudagin var horvið undir veitsluróminum sunnudagin.

Tað vísti seg tó, at tað var venjarin, Faxe, sum hevði tikið steypið við sær til hús, so nú skuldi alt verið komið í rættlag aftur hja Jákupi og teimum.

**Máltindurin**

| | | |
|---|---|---|
| Gunnar Mohr | HB | 5 |
| Rúni Petersen | ÍF | 5 |
| Johnny Samuelsen | B36 | 3 |
| Heini Heinason | GÍ | 3 |
| Johan Lützen | HB | 3 |
| Bárður á Lakjuni | ÍF | 3 |
| Kristian í Vági | LÍF | 3 |
| Bergur Djurhuus | NSÍ | 3 |
| Hðkon Lundholm | B36 | 2 |
| Karl Leonsson | B36 | 2 |
| Rógvi Róin | B36 | 2 |
| Andreas Dahl | EB/Str. | 2 |
| Dánjal Magnussen | EB/Str. | 2 |
| Halldórur Joensen | EB/Str. | 2 |
| Jón Sigurð Gleðisheyg | EB/Str. | 2 |
| Jan Skoradal | GÍ | 2 |
| Magnus Dalbø | GÍ | 2 |
| Uni Mortensen | HB | 2 |
| Eyðolv Petersen | ÍF | 2 |
| Erik Langgaard | LÍF | 2 |
| Fróði Jóanesarson | NSÍ | 2 |
| Jan Nónklett | NSÍ | 2 |
| Allan Michelsen | Royn | 2 |
| Bárður Dimon | TB | 2 |
| Dan Mortensen | TB | 2 |
| Hallur Christiansen | TB | 2 |
| Óli Johannesen | TB | 2 |



# Lýsingartorgið

**Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:**
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**Vanl. lýsingaprísur:**
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

**tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

## Akfør

**AUDI 100**
árg. 87, koyrt 202.000 km, heilgalvaniseraður (rustar ikki), sýnaður 10/99, til sølu fyri uml. 15.000 kr.
Tlf. 313701 og spyr eftir Christian

**AUDI 80 1.8S**
árg. 88, heilgalvaniseraður, hevur sóltak, servostýring, radio og alu felgur. Kostnaður 65.000 kr.
Tlf. 218778

**BILUR TIL SØLU**
Ein eldri Volvo 245 S.T.W., sýnaður í mars 2000, til sølu ella í býti við ein lítlan bil. (Bilurin stendur í Havn).
Tlf. 373159, um kvøldið

**BILUR TIL SØLU**
Toyota Landcruiser, árg. 83, til sølu fyri 25.000 kr.
Tlf. 220149

**CARINA E 2.0 DIESEL**
árg. 5/96, heillakeraður mai 2000, sýnaður 12/99, koyrt 174.000 km, og koyrt sum skúlavognur 163000 km, til sølu fyri kr. 115.000.
Tlf. 319961 eftir kl. 18

**CITROËN DIESEL**
BX 1,9 turbo, árg. 11/88, koyrir 17 km/ltr., hevur nýumvældan motor, nýggja turbo, útstoyt, bremsur o.a. + el-rútar, servostýring og sentrallás, til sølu fyri 29.000 kr. ella hægsta boð yvir.
Tlf. 212055

**CITROËN XANTIA**
Turbo diesel, árg. 7/98, 48.000 km, við 16" alu. felgum, til sølu fyri 165.000 kr.
Tlf. 211990

**DAEWOO LANOS**
Ein 1 ára gamal grønur Daewoo Lanos til sølu, er frá mai 1999. Hevur bert koyrt 3.200 km, er sera vælhildin og er sum nýggjur.
Tlf. 217847
ella 317847

**DATSUN STANZA**
árg. 82, uttan plátur, aut. gear til sølu sum eykalutir.
Tlf. 457895

**DIESEL BILUR**
Ein VW Passat diesel til sølu. Árg. 87.
Tlf. 318157 ella 220008

**DYNAMO**
Ein dynamo til Honda Accord árg. 87 ynskist til keyps.
Ring á tlf. 212462 ella 422462 eftir kl. 19

**EYKALUTIR**
til Daihatsu Charmant bíliga til sølu.
Tlf. 213577

**FELGUR**
við góðum dekkum, 155/70/13, til ein VW Golf, árg. 88, bíliga til sølu.
Tlf. 320294, e. kl. 18

**FERRARI GR 2300 S**
krani til sølu.
Tlf. 449045 ella 283753 e. kl. 17

**FORD ESCORT**
14 CL til sølu, bæði sproytaður og sýnaður í 1999, koyrt 142.000 km, kr. 11.000.
Tlf. 441891 ella 211841

**FORD FIESTA**
árg. 87 til sølu fyri sámuligan prís. Píkadekk fylgja við.
Tlf. 319529 aftaná kl. 19

**FORD FIESTA GHIA**
árg. 85 til sølu. Sýnaður á heysti 99. Koyrt 98.000 km.
Tlf. 310574

**FORD ORION 1.8 D**
ynskist til reservalutir ella Escort fyri ca. 1.000-3.000 kr.
Tlf. 423572 ella 210560

**FORD SIERRA 1,6**
nýsýnaður, ongan kross, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 312669 - 222219

**FORD SIERRA 1.6**
til sølu sum eykalutir. Hevur góðan motor, nýggjan forrút og fleiri nýggjar eykalutir.
Tlf. 313133

**HONDA ACCORD**
árg. 89, hevur el-rútar og el-sóltak, servostýring, sportsfelgur, er senkaður, til sølu fyri 28.000 kr.
Tlf. 449005, e. kl. 18

**HONDA ACCORD**
árg. 85, bíliga til sølu. Krevur ábøtur.
Tlf. 421060, e. kl. 18, Olivar

**HONDA CIVIC 1,3**
til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 312669 - 222219

**JEEPUR**
Mitsubishi Pajero, 4 hjólstrektur, turbo diesel, 7 sitipláss, árg. 86, koyrt 167.000 km, til sølu fyri uml. 20.000 kr.
Tlf. 317676

**KAMPINGÚTSTÝR TIL SØLU**
t.d. komfýrur, køliskáp, wc, vask, skáp. Ger tín egna kampingbuss, í súmmarhús ella í bát 3000 kr.
tlf. 423572 ella 210560

**LANDROVER**
110 turbo diesel, til sølu.
Tlf. 328081

**MAZDA 323**
árg. 85 til sølu vegna flyting. Sýnaður í januar 2000. Er í góðum standi. Prísur min. 8.000 kr.
Tlf. 221901 ella 319021

**MAZDA 626**
árg. 84, sera bíliga til sølu. Eitt sett av felgum við dekkum og aðrir eykalutir fylgja við.
Tlf. 215543

**MAZDA 626**
árg. 87, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 423073 - 220653

**MITSUBISHI CANTER**
lastbilur, 6 tons, árg. 88, bíliga til sølu.
Tlf. 287622

**MITSUBISHI PAJERO 23 TD**
árg. 86, til sølu.
Tlf. 283058 ella 443058

**NISSAN MICRA**
1.0 frá 1984, 200.000 km til sølu fyri 2.500 kr. koyrir væl, men Bilsýnið krevur ymiskar ábøtur framdar.
Tlf. 332858 eftir kl. 19

**NISSAN MICRA**
árg. 88, bíliga til sølu. Lakeraður á heysti 99.
Tlf. 371844 ella 214844

**OPEL CORSA**
árg. 12/86, til sølu sum eykalutir fyri 2.500 kr. Hevur plátur.
Tlf. 441040

**OPEL CORSA 1.4**
16V vælhildin við 4 hurðum, alufelgum bíliga til sølu, árg. 11/96, koyrt 41.000 km.
Tlf. 310161 ella 211161

**OPEL MANTA**
14 ára gamal Opel Manta til sølu.
Tlf. 375380

**PEUGEOT 205 XS**
árg. 88 í góðum standi, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 314569

**PÍKADEKK**
til Ford Sierra til sølu.
Tlf. 313133

**SPORTFELGIR**
ynskjast fyri 2.000 kr. 10 cm. millum hol.
Tlf. 423572 ella 210560

**SPORTFELGUR**
Fýra sportfelgur 205/50 R15 til sølu um hóskandi boð fæst + eitt sett av hátalarum av slagnum Pioneer TS-2150.
Tlf. 221584

**SPORTFELGUR**
Fýra sportfelgur til sølu, 5 hol, 195/15/50 fyri kr. 3.500,-
Tlf. 211525

**STATIONCAR**
Ford Sierra 1,6 CL, árg. 87, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 221677, e. kl.18.00

**SUBARU 1.6**
coupe, árg. 86, koyrt 139.000 km, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 316236

**TIL HONDA ACCORD**
typ SY árg. 83. Motorur Typ EL 1602 ccm við gearkassa og drívakslum. Áhugað ringið
tlf. 421364 ella 222535

**TIL SØLU**
Nýsýnaður Toyota Carina stationcar 1,6, árg. 90, koyrt 124.000 km, til sølu. Bilurin er í sera góðum standi.
Tlf. 447221/448454

**TIL SØLU**
VW Golf 1,9 diesel, frá 94, og Ford Fiesta 1,8 diesel, frá 92. Báðir bilarnir eru í sera góðum standi.
Tlf. 444943 ella 217704

**TIL SØLU**
Fýra dekk, 195/65-15 og tvey dekk, 185/65-15, bíliga til sølu.
Tlf. 211990

**TIL SØLU**
Fýra sportsfelgur við 5 holum, 195/15/50, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 211525

**TIL SØLU**
Citroën BX 19 TRS stationcar, blágráur, koyrt 154.600 km, í besta standi, til sølu.
Tlf. 314107

**TIL SØLU**
Toyota Corolla 1,3 ETI EE101 Hatchback, árg. 10/93, reyður, sera vælhildin, hevur verið til Tidycar hvørt ár og er nýsýnaður.
Tlf. 282953 ella 443226

**TIL SØLU**
Toyota Carina II, árg. 89, koyrt 155.000 km, el-rútar, 15" sportsfelgur, sýnaður í 98, ongan kross, sær sera gott út.
Tlf. 448344, John

**TIL SØLU**
15" sportsfelgur, passa til Toyota og VW, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 220149

**TIL SØLU**
Fiat Uno 70 SL, árg. 89, sýnaður í mai 2000. Prísuppskot 15.000 kr.
Tlf. 310609

**TIL SØLU**
Ford Mondeo Diesel TD 1.8 til sølu. Hevur sóltak, powerstýri og el-rútar.
Tlf. 451024

**TOYOTA CARINA E**
2000 GLI, í sera góðums tandi, til sølu.
Tlf. 222016

**TOYOTA CARINA II**
árg. 1985 til sølu fyri kr. 5.000,- ella hægsta boð yvir. Hevur spildurnýggj dekk.
Tlf. 312323

**TOYOTA HIACE**
árg. 88, vørubilur, til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 422572

**TOYOTA HiACE**
minibussur, árg. 86 til sølu. Hevur dieselmotor.
Tlf. 221503

## Amboð

**TIL SØLU**
Gamal traktorur »Ford 5000« við skuffu framman og 2,3 m breiðum kusti, í rímuliga góðum standi, koyrt 3400 tímar.
Tlf. 216442

## Arbeiði

**ARBEIÐI SØKIST**
Eg eri ein 15 ára gamal drongur, ið søki arbeiði eftir skúlatíð og í summarfrítíðini. Alt hevur áhuga.
Tlf. 311199

**BILFØRARI**
søkist.
J.S. Bilar - Tlf. 211166

**MÁLING AV TEKJUM**
Eg máli tekju tygara skjótt og væl. Koyri kring landið.
Tlf. 332005, e. kl. 18

**TILBOÐ YNSKIST**
uppá at stoypa garð.
Tlf. 314797

## Barnaútgerð

**BERISTATIV**
Er nakar, ið kann selja okkum eitt beristativ?
Tlf. 310529

**BRÚKTUR BARNAVOGNUR**
kann gerast til stól. Bert brúktur til eitt barn, bíliga til sølu.
Ring 422147

**MYRKABLÁUR**
barnavognur við lift, tasku, regnslag og flugunet til sølu fyri 1300 kr, lítið brúktur.
Tlf. 317775

**RÁHVÍTUR**
Brio barnavognur saman við regnslagi til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 443315

**REGNTÆTTUR**
stórur barnavognur við babylift til sølu. Bert brúkt til eitt barn.
Tlf. 310836

**TIL SØLU**
Barnavognur við lift, dýnu og koda, regnslagi og tasku til sølu fyri 1.600 kr.
Tlf. 441280

**TIL SØLU**
Gráur Brio leðurlook barnavognur við lift bíliga til sølu.
Tlf. 316181, e. kl. 17

**TIL SØLU**
Bilstólur, Britax (Rock-a-Tot), kann berast, støðd 0-15 mðr. (uml. 13 kg). Sera vælhildin. Til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 319510, e. kl. 17

**TIL SØLU**
Brio koyristólur 2 ár. Bilstólur til barn 1-5 ár.
Tlf. 375251

**TIL SØLU**
Bláur, prikkutur combibarnavognur til sølu. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 313004

**YNSKIST**
Bilstólur, std. 0 til uml. 20 kg, ynskist til keyps.
Tlf. 314797

## Barnaansing

**HEY!**
Eg søki eina álítandi kvinnu at ansa eftir 3 ára gamla soni mínum frá kl. 8-14.
Ring 313976

## Bátaútgerð

**AVHEINTINGARTILBOÐ**
Speedbátur, 15 fót, siglir ca. 30 míl, 40 HK Mariner, el-start, VHF, tveir bensintangar, kumpass o.a. Á vogni. Til sølu fyri 19.000 kr. ella boð yvir.
Tlf. 319567

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ ..................

**Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi**

Sent hevur:

Navn: ..........................................................

Bústaður: ......................................................

Bygd/býur: ....................................................

Tlf.: ...............

»Lýsingartorgið«
*Tíðindablaðið*
**Sosialurin**
Box 76,
110 Tórshavn

**Til frímerki**